# Vallari hav nú góða nátt

*Seinasta bókin í røðini Søga og stev er komin út. Bókin er tann sætta í røðini, sum Árni Dahl hevur skrivað*



Bókarøðin Søga og stev, sum Árni Dahl fór undir í 1996, er komin at enda við sættu bókini, sum er komin út.

Forlagið Fannir hevur givið út bókarøðina Søga og stev, sum er ummæli av kvæðum, vísum og tættum, sum ofta ella av og á hava verið havd á gólvi. Bókarøðin byggir á kvæðasendingar, sum Árni Dahl hevur havt í Útvarpinum gjøgnum nítiárini.

Hesar fittu handbøkurnar eru frálíkar at hava, tá ein skal hyggja eitt sindur at uppruna og søgu hjá ymsum kvæðum og vísum.

Tað eru, sum vera man, helst minni kendar vísur, sum eru við. Tó er onkur heilt kend ímillum, treyðugt so.

Hugaligt er at sita við bókini í hondini og leita seg fram til ymiskt, ein ikki visti frammanundan. Tí hóast tað er sagt í Útvarpinum, fer tað skjótt afturvið. Í eini slíkari hondbók er tað at taka í og kann finnast fram aftur, tá brúk og áhugi er fyri tí.

Nítjan eru titlarnir, sum viðgjørdir verða í seinastu bókini í hesi røðini.

Aftast í bókini eru prentað yvirlitslisti og navnaskrá til allar seks bøkurnar. Ein stórfingin listi við umleið 2.000 leitiorðum. Bókin er 205 blaðsíður og kostar 200,-krónur.

**ej**

# Krevja upprudding á Sernámsdeplinum

*Skúlin á Trøðni og Sernámsfrøðisliga Ráðgevingin eru løgd saman til Sernámsdepilin, men løgfrøðingar ivast í lógarheimildunum. Lærararáðsnevndin á skúlanum á Trøðni vil hava greiði á viðurskiftunum á Sernámsdeplinum, sum skapa ótrygd millum starvsfólkið*

EYÐUN KLAKSTEIN

Viðurskiftini á Sernámsdeplinum eru so ógreið, at løgfrøðingar ivast í lógarheimildunum undir stovninum, og lærararáðsnevndin mælir til eina skjóta upprudding.

Orsøkin til stóru misnøgdina millum lærararnar er, at Skúlin á Trøðni í 1998 varð lagdur saman við Sernámsfrøðisligu Ráðgevingini undir nýggja heitinum Sernámsdepilin, hóast ivasamt er við heimildini fyri hesum.

Síðani er virksemið hjá skúlanum minkað. Lærarar fáa nú eisini ráðgevararuppgávur, og eingin veruligur skúlastjóri er á skúlanum, soleiðis sum lógin annars ásetur.

Alt hetta kemur fram í eini frágreiðing, sum Lærararáðsnevndin í Skúlanum á Trøðni hevur gjørt, og sum Sosialurin hevur fingið innlit í.

– Viðurskiftini á Sernámsdeplinum eru ein stór fløkja, sum myndugleikarnir eiga at greiða sum skjótast, sigur Jan Christiansen, sum er næstformaður í Lærararáðsnevndini á Skúlanum á Trøðni.

## Manglar reglugerð

Skúlin á Trøðni, sum hevur til uppgávu at undirvísa børnum, sum hava eitt hvørt brek, varð niðurlagdur sum sjálvstøðugur undirvísingarstovnur í 1998.

Tá varð hann lagdur saman við ráðgevingarskipanini hjá Landsskúlafyrisitingini undir nýggja heitinum Sernámsdepilin.

– Síðani hevur støðan á stovninum verið ógvuliga ógreið, sigur Lærararáðsnevndin í síni frágreiðing, sum varð gjørd í juni mánaði.

– Eingin reglugerð hevur verið fyri Sernámsdepilin, sum hevur verið bæði undirvísingarstovnur og ráðgevingarstovnur í senn, hóast greiður munur er í fólkaskúlalógini millum hesar báðar skipanir, verður sagt í frágreiðingini.

Munurin millum Sernámsfrøðisligu Ráðgevingina og Skúlan á Trøðni er, at um foreldur ynskja, at barn teirra skal ganga í vanliga fólkaskúlanum, skal Sernámsfrøðisliga Ráðgevingin syrgja fyri, at barnið fær sernámsfrøðisliga hjálp. Um foreldrini ikki vilja hetta, so stendur teimum í boði at kunna senda barn teirra í serskúla –Skúlan á Trøðni.

– Føroya løgting hevur ongantíð tikið politiska avgerð um, at hetta skal gerast ein og sama skipan, vísir nevndin í Lærararáðnum á Skúlanum á Trøðni á.

## Løgfrøðingarnir ivasamir

Í mai mánaði í ár vórðu tveir løgfrøðingar bidnir at meta um viðurskiftini á Sernámsdeplinum. Eisini Foreldraráðið bað ein løgfrøðing, Sigmund Poulsen, gera eitt upprit um Sernámsdepilin.

Orsøkin til hetta er, at Lærararáðsnevndin heldur, at fyrisitingin rekur skúla uttan at hava nakra heimild fyri tí.

Í sínum uppriti sigur Sigmund Poulsen, at hann duggir ikki at síggja beinleiðis í fólkaskúlalógini ella aðrari lóg heimildina til at gera Skúlan á Trøðni til ein undirskipaðan part av einum nýggjum stovni.

Eisini hinir báðir løgfrøðingarnir, Hans Trygvi Teirin og Bjørn á Heygum, ivast í heimildargrundarlagnum undir Sernámsdepilinum.

– Um ætlanin er, at Skúlin á Trøðni ikki longur skal verða ein skúli, men ein deild av einum stovni, so er tað mín fatan, at landsstýrismaðurin hevur ikki fingið heimild til at skipa Skúlan á Trøðni sum annað enn skúli, sigur Sigmund Poulsen í sínum uppriti.

## Í stríð við fólkaskúlalógina

Bjørn á Heygum sigur í sínum svari, at landsstýrismaðurin hevur ikki nóg greiða heimild til, at fyrisitingin kann fara undir at reka ein slíkan skúla (Skúlan á Trøðni, blðm.)

– Eingin ivi er um, at skúli og lærarar skulu fylgja ásetingunum í fólkaskúlalógini og annars skipað seg undir tann leiðslubygnað, sum fólkaskúlalógin fyriskipar, sigur Bjørn á Heygum, løgfrøðingur.

Og hetta verður ikki gjørt, vísir Lærararáðsnevndin á.

– Stjórin fyri Skúlan á Trøðni, sum fram til 31. desember í 1997 hevði havt fulla ábyrgd av skúlanum, gjørdist nú deildarleiðari uttan ábyrgd í Sernámsdeplinum, sigur Lærararáðsnevndin í frágreiðing síni.

– At ein skúlastjóri gerst ein deildarleiðari uttan ábyrgd er beinleiðis í andsøgn við fólkaskúlalógina, staðfestir frágreiðingin.

Jan Christiansen, sum er næstformaður í nevndini fyri Lærararáðið, sigur, at tey vilja hava greiði á viðurskiftunum á skúlanum.

– Her eru ymisk hugtøk fløkt soleiðis saman, at øll viðurskifti á Sernámsdeplinum gerast líka ógreið. Hetta kann ikki ganga ár eftir ár, og tí vilja vit hava landsstýrismannin at fáa skil á viðurskiftunum, sigur Jan Christiansen.

*Tíðindaskriv*

# Svenna vitjar

Svenn Arne Lysgård, vanliga nevndur Svenna, kemur í oktober mánað á sína fyrstu Føroyavitjan yvirhøvur. Ferðin er løgd til rættis soleiðis, at vitjað verður á hesum støðum: ”Kelduni” í Skálfirði, ”Betania”, Skopun og ”Evangeliihúsinum”, Tórshavn. Vitjanin byrjar leygardagin 7. oktober og endar sunnudagin 15. oktober.

Flestu Føroyingar kennast uttan iva væl við sangin: „Det kommer en ny tid“, sum ofta og títt verður spældur í ymsu útvarpum okkara, men tey flestu vita kortini ikki hvør tað er, ið upprunaliga hevur skrivað sangin. Tað er júst Svenna, men vit kennast best við sangin innspældan og sungnan av Kjell Samuelson. Tað er nú so, at Kjell við loyvi frá Svenna hevur skrivað eitt triðja vers til sangin og Kjell dámdi sangin so væl, at hann vildi hava hann innspældan. Síðani hevur hesin sangurin rungað, sum ongantíð fyrr.



*Svenn Arne Lysgård*

Eitt er sangurin, men sjálvur persónurin Svenna er ein søga fyri seg. Nærum alt lív sítt hevur Svenna sungið og spælt. Sum skúlaungdómur var Svenna nógv happaður og var tónleikurin og sangur hansara ein máti at gera seg galdandi millum sínar javnlíkar uppá. Hann er føddur og uppvaksin í einum trúgvandi heimi, men skjótt gjørdust mongu tilboðini hann fekk ov lokkandi fyri hann at fara til støð og hendingar, ið ikki rættuliga samstemmaðu við gleðiboðskapin um Jesus, og Svenna fall frá í mong ár, men ein dag gjørdist gleðiboðskapurin um Jesus honum ov sterkur. Móðurbønin hevði eisini sína ávirkan, tí Svenna møtti í 70-árunum teimum sokallaðu „Jesus-fólkunu“, t.v.s. ungir hippiarar, ið líktust honum sjálvum — men, tó var ein munur at síggja, tí hesi høvdu ein annan boðskap at bera. Eygu teirra strálaðu av Guds kærleika og tey høvdu verunliga møtt Jesusi. Øll hesi árini burturi frá Jesusi fóru illa við Svenna, tí hann livdi eitt lív fylt við misnýtslu av sterkum rúsevnum, sum høvdu síni árin á hann.

Svenna upplivdi persónliga frelsu og fekk lovi at uppliva eina ríka tíð við møtirøðum og stórari vekking. Hann hevur ferðast runt í øllum Europa og havt framførslur á skúlum, fongslum, í kirkjum, í útvarps- og sjónvarpssendingum. Einki umhvørvi — eingin lurtarafjøld — hevur verið fremmand fyri Svenna. 30 ár innan yrkið hava givið honum ríkar royndir, bæði sum artistur og evangelistur. Hann syngur alt innan, popp, rock, blues og country og nógv av tilfarinum hann nýtir, hevur hann skrivað sjálvur. 9 plátu/fløguinnspælingar eru komnar frá hansara hond. Ein er enntá innspæld yviri í Nashville í U.S.A., har hann eisini hevur luttikið í vælkendu konserthøllini Grand Ole Opry.

Svenna hevur eisini luttikið við sangi og vitnisburði innan fongsulsmúrarnar. Í Ungarn herfyri fekk hann loyvi at uppliva fleiri kvinnur gera upp við sítt gamla lív og byrja aftur av nýggjum við Jesusi.

Svenna er giftur við svensku Astrid og býr nú í Mølndal, tætt við Gøteborg í Svøríki. Hann hevur hálvtíðarstarv í Hvítusunnusamkomuni har, og hina tíðina nýtir hann í tænastuni at ferðast runt við gleðiboðskapinum um Jesus, sum er mentur at umbroyta alt. Svenna vitnar persónliga á seinastu fløguútgávu síni „Trygg och fri“, hvussu hann upplivdi hesa umbroting í lívi sínum við lagnum ”Ofta ensam”.

Á møtunum fer Svenna at spæla bæði kendar og minni kendar sangir, ið allir eru ein lovsongur til Harra okkara Jesus, fyri tað hann hevur gjørt og ger. Eisini talar og vitnar hann. Harumframt verður Svenna at hoyra í okkara ymsu útvarpsfjølmiðlum hesar dagarnar hann vitjar í Føroyum.

Almenna skráin fyri vitjanina er henda: 7. og 8. oktober Keldan, Skálafjørður. 10. oktober Betania, Skopun. 15. oktober Evangeliihúsið, Tórshavn

Øll eru hjartaliga vælkomin til hesi møtir, og eisini at taka onkran við. Sum fíggjarliga hjálp til útreiðslurnar, verða offur upptikin á nøkrum av møtunum.




A 50 ár

*Vit væntaðu nøkur.*
*Ivaðust í summum.*
*Men at tit komu so fjølment*
*inn á gólvið leygardagin,*
*gjørdi okkum ovfarin.*
*Takk fyri tað.*
*Og túsund takk fyri gávur,*
*blómur og kveikjandi ynskir.*

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Jolly** 1,5 l. | +pant **9,95** | **Swan hveitimjøl** 1,5 kg | **11,95** |
| **El´Vital shampoo og balsam** 250 ml. | **24,95** | **Libero blæður** dupultir pakki | **144,95** |
| **Ty phoo tea** 120 brøv (80+50%) | **22,95** | **Kit kat** pakki við 3 stk. | **9,95** |
| **Burton´s Homeblest** 200 g | **8,95** | **Smarties** pakki við 3 stk. | **12,95** |
| **Burton´s Viscount** mint + orange, 8 stk. | **8,95** | **Ajax reingerð** 1250 ml. | **24,95** |
| **Cadbury´s Crunchie** 2 stk. | **10,-** | **Lørdagspizza** 620g, 3 fyri | **50,-** |
| **Kemilux sitrón úppvask** 500 ml. | **7,95** | **Ísl. Lambsbógvar** uml. 2,3kg, fyri kilo | **27,95** |
| **Ísl. Egg** 10 stk. | **7,95** | **Høsnarungar** 1100 g, 3 fyri | **50,-** |
| **Merrild kaffi** 500 g | **19,95** | **Danbo 45%** 1/4 ostur uml. 2 kg, pr. kg. | **36,95** |
| **Fóm Ísterta** 4 ymisk sløg | **21,95** | **Rynkeby 16 søtar appelsinir** 1 ltr. | **7,95** |
| **Gott og blandað Salt og Blandað** 265 g | **19,95** | **Rynkeby 16 saftig súreplir** 1 ltr. | **7,95** |
| **OMO vaskipulvur** 1,8 kg | **24,95** | | |

*Keypmaðurin “úti í Grønlandi”*

Pf. Johannes Andreasen
Grønlandsvegur 16

Tilboðini eru galdandi til og við leygardagin

stephanssons hús